# Studentaskúlin verður í Vági

*Stendur tað til landsstýrið, verður nýggi studentaskúlin í Suðuroynni bygdur í Vági*



*Studentaskúlin í Vági húsast í løtuni í hesum báðum bygningunum umframt fólkaskúlanum* *Mynd: Jens K.Vang*

JOHN JOHANNESSEN

Um fimm ár skal nýggjur stundentaskúli fyri 21 milliónir krónur takast í nýtslu í Vági.

Nýggjur langtíðaríløguætlan landsstýrisins mælir til at seta 21 milliónir av til nýggjan stundentaskúla í Suðuroynni.

Men virkandi landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum staðfestir, at ætlan landsstýrisins er at byggja skúlan í Vági.

Ætlanin er, at tær 21 milliónirnar, nýtast skulu til nýggja skúlan, skulu setast av á fíggjarlógini yvir trý ár. Fyrstu milliónirnar skulu setast av í 2002 og tær seinastu í 2004.

**Ætlanin ikki liðug**

Langtíðaríløguætlanin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum er enn bert eitt útkast, og tí er ikki heilt greitt, at skúlin verður liðugur í 2004. Áðrenn hetta endaliga kann staðfestast, skal íløguætlanin viðgerast bæði í landsstýrissamgonguni og í løgtinginum.

Tí ber heldur ikki til endaliga at staðfesta, at skúlin verður bygdur í Vági. Hendan avgerðin skal nevniliga eisini viðgerast politiskt í løgtinginum.

Men ætlan landsstýrissins er, at skúlin skal vera í Vági. Grundgevingin fyri hesum er, at íløgur mugu gerast, at búskapurin ikki er ovurupphitaður, og tað er hann ikki í Vági. Har er heldur talan um ein tørv fyri at skapa virksemi.

Karsten Hansen segði fyrr í vikuni við Sosialin, at tey, sum vara av skúlanum, mugu finna út av, um byggjast skal upp í verandi skúla í Vági, ella ein heilt nýggjur skúli skal gerast.

**Ósamd um skúlan**

Tá talan fyri skjótt tíggju árum síðani var um at byggja nýggjan skúladepil í Suðuroynni, tók rættuligt stríð seg upp millum Tvøroyri og Vág um, hvar nýggi skúlin skuldi liggja.

Løgtingið gjørdi tí av, at nýggi skúladepilin skuldi byggjast miðskeiðis í oynni, nevniliga í Hovi. Hendan ætlan gjørdist tó ikki veruleiki, men í staðin varð gamla posthúsið í Vági umvælt, og skúlin varð savnaður í Vági í fólkaskúlanum og í nýumvælda skúlanum. Áðrenn hetta var HF skeiðið bæði áTvøroyri og í Vági.

# Klárt at bovla í september

*Í september letur upp bovlingarhøll við seks nútímans vøllum á Hálsi í Havn*



*Arbeitt verður av øllum alvi fyri at bovlinghøllin skal vera klár at taka í nýtslu í september* *Mynd: Jens K. Vang*

JOHN JOHANNESSEN

Eitt privat felag við Bjarna Kyster á odda er farið undir at gera bovlingarhøll í Havn.

Arbeitt verður í løtuni við at gera hølini í bygninginum hjá Thomas Dam á Hálsi klár, soleiðis at høllin kann lata upp í september.

Høllin skal hava seks vøllir, sum eru fult á hædd við teir, vit kenna frá stórum bovlingarhallum uttanlands. Tað verða teldur, sum av sær sjálvum rokna stigini út, og keylurnar syrgir ein maskina fyri at seta upp fyri bovlararnar.

**Søkt um ølloyvi**

Afturat bovlingarhøllini skal vera ein lítil matstova, har til ber at fáa sær léttan mat og eina øl afturvið.

Bjarni Kyster, sum verður leiðari av høllini, sigur, at talan verður ikki um eina matstovu, ið selur enskar búffar og annað líknandi. Matstovan skal selja léttari og bíligari mat, sum tú kanst njóta eina øl afturvið, tá tú ert liðugur at bovla.

Bovlingarhøllin hevur enn ikki fingið ølloyvi, men fær hon tað, skal tað bera til hjá bovlarunum at leska sær á eina øl meðan teir spæla. Talan verður kortini ikki um nakra bar, og sterkari løgur enn øl verður ikki seldur.

**Tarnað av ídnaðarfrítíðini**

Arbeiðið at gera bovlingarhøllina klára er eitt sindur tarnað av ídnaðarfrítíðini í Danmark, og tí ber ikki til at lata høllina upp fyrr enn í september.

Loftið til høllina og sjálvir vøllirnir liggja enn í Keypmannahavn, orsakað av ídnaðarfrítíðini.

Bjarni Kyster vil ikki siga, hvussu stór íløgan í bovlingarhøllina er, men hann sigur seg vera vísan í, at hon fer at bera seg.

Fá títt lívsins "kick"!

Lær fremmant mál og mentanir!
Lær um tænastu, sølu og persónliga menning!

Far á ferðaleiðaraskúla í heyst 2000 á Costa Brava, og blív ferðaleiðari til veturin í summar og sól!

500 arbeiða í øllum heiminum – skúlin tryggjar øllum útbúnum og egnaðum ferðaleiðarum starv.

Service & Co er størsti og ídnasti ferðaleiðaraskúlin í Skandinavia. Har verða ferðaleiðarir útbúnir til alla ferðavinnuna.

Bílegg ein faldara á heimasíðuni:
www.service-co.dk

Ella ring til Toru Tourist Traffic í Tórshavn á tel. 31 55 05 og fá ein faldara sendan heim til tín. Heidi, Rósmari og Uffe á Toru Tourist hava øll verið á skeiðið hjá Service & Co og kunnu svara øllum spurningum.

SERVICE&CO
DANMARKS INTERNATIONALE SERVICESKOLE



# Byggitek bæði vrakað og virt

*Ein heildarmeting hjá p/f Vágatunnilinum ger, at Byggitek ikki kann brúkast til at gera vegirnar. NCC hinvegin hevur einki at seta fingurin á og brúkar Byggitek at hjálpa sær við tunlinum*



*Í avtaluni, sum P/f Vágatunnilin hevur undirskrivað, sleppur Byggitek upp í part. Fyritøkan sleppur ikki at gera vegirnar, men skal hjálpa NCC at gera tunnilin* *Mynd: Jens K. Vang*

DIA MIDJORD

NCC Vágar konsortiið hevur ongar trupulleikar við at brúka Byggitek sum samstarvspartnara, men p/f Vágatunnilin sær eitthvørt ivasamt í hesi fyritøku. Í hvussu so er slapp Byggitek ikki at gera vegirnar, hóast fyritøkan átti lægsta tilboðið.

Stjórin á Byggitek, Tummas Sørensen, hevur ongar viðmerkingar til málið. Hann sigur kortini, at okkurt fer at koma frá fyritøkuni í næstum.

Økisstjórin hjá NCC Danmark, Niels Larsen, vil heldur ikki leggja seg út í nakað stríð. Men váttar, at byggirisin NCC hevur fult álit á Byggitek.

– Vit koma saman við Byggitek at loysa uppgávu okkara í felag, sigur Niels Larsen.

**Óvanlig mannagongd**

Tað var út frá eini heildarmeting, at fyritøkan J. K. Petersen við næstlægsta tilboði varð tikin framum. P/f Vágatunnilin vrakaði sostatt Byggitek, men visti at fyritøkan var samstarvspartnari hjá NCC, ið átti lægsta tilboð og fekk arbeiðið at gera sjálvan tunnilin.

– Eg kann siga tað soleiðis, at tað fyri okkum ikki var eitt minus í rokningini, at NCC júst hevði valt Byggitek at hjálpa sær við arbeiðnum, sigur nevndarformaðurin í p/f Vágatunlinum Klæmint Weihe.

Nevndarformaðurin sigur víðari, at tað hevur hent fyrr, at næstlægsta tilboð er tikið framum.

– Men tað skerst ikki burtur, at hetta er alt annað enn vanlig mannagongd. Men tað var sum sagt ein heildarmeting, ið fekk okkum at taka hesa óvanligu avgerð, sigur Klæmint Weihe.

Og talan er um eina rættiliga óvanliga avgerð. Tað váttar í øllum førum Niels Larssen, økisstjóri hjá NCC Danmark, ið hevur verið við til hópin av slíkum útbjóðingum í Europa.

# Watson ligið longri enn ætlað

*Tá vit tosaðu við havnaskrivstovuna í Lervick fyrrapartin í gjár, lá Ocean Warrior framvegis við bryggju*



DIA MIDJORD

Ocean Warrior kemur eftir øllum at døma aftur til Føroya sunnudagin ella fyrst í komandi viku. Havnaskrivstovan í Lervick segði klokkan ellivu í gjár, at Ocean Warrior framvegis lá við bryggju.

– Paul Watson fráboðaði okkum hósdagin, at skip hansara Ocean Warrior í fyrsta lagi ætlaði sær avstað út á seinnapartin fríggjadagin. Kanska bleiv tað ikki fyrr enn leygardagin.

Kortini vistu tey á havnaskrivstovuni einki um, hvar Ocean Warrior ætlaði sær. Men vit kunnu ganga út frá, at hann aftur kemur hendavegin, tí tað hevur hann sagt.

Og neyvan gevst Paul Watson fyrr enn hann hevur fingið sín vilja. Spurningurin er so bara, um føroyska løgreglan hevur sama tol.

# Skrúðgongan víðkað



*Til at markera at tað eru túsund ár síðani, at kristniboðskapurin kom til Føroya, eru samkomur og kirkjur uttan fyri fólkakirkjuna bodnar við*

DIA MIDJORD

Finnbogi ísaksson løgtingsformaður hevur gjørt av, at skrúðgongan á ólavsøku hesaferð verður víðkað.

Fimm umboð fyri kirkjur og samkomur uttan fyri fólkakirkjuna hava fingið innbjóðing. Hesi umboða brøðrasamkomurnar, hvítusunnusamkomurnar, katólsku kirkjuna, adventistakirkjuna og frelsunarherin.

Løgtingsformaðurin sigur orsøkina verða, at tað í ár eru liðin 2000 ár síðan Kristi føðing, og at 1000 ár eru liðin, síðani kristniboðskapurin kom til Føroya.

– Eg havi sent út eitt skriv og biðið um svar, áðrenn hosdagin 20. juli. Tey umboðini, ið taka av, koma at ganga aftast í røðini, har bispur og prestarnir ganga, sigur Finnbogi Ísaksson.

Hans Jacob Joensen, bispur, heldur tað vera skilagott at bjóða hesum umboðum við til skrúðgonguna í ár.

Tað verður aftur í ár gingið í trimum røðum, har oddamenninir ganga eins og teir hava gjørt seinastu tvey árini. Løgtingsformaðurin í miðjuni við løgmanni í høgru borði og bispi hinumegin.

Δ

Bilpakkar summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team 85 · 31 65 11

4 fólk í bili

Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn

Ísland
Fráf. Tórshavn 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo